UTTAN ÚR HEIMI

## Eiga at velja

Higartil hava sunnimuslimarnir í Irak sýtt fyri at taka lut í tí politiska arbeiðinum, men nú mælir ein týðandi sunnimuslimskur felagsskapur sunnimuslimunum til at skráseta seg sum veljarar undan næsta vali.

Adnan al-Dulaimi, sum er formaður í felagsskapinum, sigur sambært New York Times, at at í framtíðini eru tað atkvøður, sum leggja ta politisku kósina í Irak, og tí eiga sunnimuslimarnir at gera sítt til at fáa ávirkan á kósina. Hann ger tó vart við, at áheitanin merkir ikki, at hann og felagsskapur hansara taka undir við teirri politisku tilgongdini í Irak.

Ætlanin er, at irakar skulu á fólkaatkvøðu í oktober um eina nýggja grundlóg. Ein nevnd hevur arbeit við uppskotinum, og mánadagin bleiv avgjørt at víðka nevndina, so hon fær 15 limir afturat. Allir teir nýggju limirnir eru sunnimuslimar, skrivar New York Times.

Verður grundlógin góðkend í oktober, skulu irakar ætlandi velja nýtt tjóðarting tveir mánaðir seinni.

## Fótaspor kunnu broyta søguna

Higartil hava vísindafólk hildið, at tey fyrstu menniskjuni komu til tað norðuramerikanska meginlandið fyri 13.500 árum síðani, men nú hava vísindafólk funnið nøkur fótaspor, sum eru nógv eldri enn so.

Fótasporini eru funnin nærhendis einum gomlum grótbroti tætt við gosfjallið Cerro Touquilla nakað sunnan fyri Meksiko Bý, og bretskir granskarar, sum hava kannað fótasporini, halda, at tey eru umleið 40.000 ára gomul.

Vísindafólk hava higartil hildið, at tey fyrstu menniskjuni komu til Norðuramerika í teirri tíðini, tá tað var landfast ímillum Norðuramerika og Asia aftan á ta seinastu ístíðina. Men teir bretsku granskararnir halda nú, at tey fyrstu menniskjuni komu hagar eftir sjónum.

## Ríkar seg upp

Russiski oljuríkmaðurin Roman Abramovitsj hevur gjørt av at fáa sær eitt ovurstórt vinningsbýti burtur úr felagnum Sibneft, sum hann eigur meirilutan av.

Sambært norska blaðnum Dagens Industri hevur Abramovitsh gjørt av, at felagið skal rinda einar 14 milliardir krónur í vinningsbýti. Sjálvur eigur hann 57,5 prosent av felagnum, og tað ger, at hann fær einar átta milliardir krónur in á sína egnu bankabók. Tíðindini um vinningsbýtið eru komin óvart á eygleiðarar, tí fyri stuttum kunngjørdi Sibneft, at felagið fór ikki at rinda vinningsbýti hesaferð. Tað er heldur ikki greitt, hvussu stórt avlop felagið hevði í fjør.

Sambært tíðarritinum Forbes er Roman Abramovitsj nummar 21 í røðini av heimsins ríkastu monnum. Hildið verður, at tann 38 ára gamli russiski ríkmaðurin eigur góðar 80 milliardir krónur.

Á okkara leiðum er Roman Abramovitsj kendur sum maðurin, ið eigur enska fótbóltsfelagið Chelsea.

## Vandross deyður

Kendi soulsangarin Luther Vandross er deyður. Hann var 54 ára gamal.

Luther Vandross, sum er kendur fyri løg sum "Power of Love" og "Always and Forever", stríddist við fiti og ymsar sjúkur í mong ár. Fyri tveimum árum síðani fekk hann ein hjartatilburð, sum rakti hann so meint, at hann kom ongantíð fyri seg aftur.

Tann best umtókta útgávan hjá Luther Vandross var uttan iva "Dance with My Father", sum hann gav út í 2003, og sum hann eisini fekk eina Grammy-virðisløn fyri. Í 1999 fekk hann virðislønina "Quincy Jones Award for Outstanding Canser".

# Óttin fyri fleiri ódnum ávirkar oljuprísin

**Amerikanskir veðurmenn vænta fleiri ódnir í Meksikanska Flógvanum í ár, og tá ávirkar oljurprísin**

VEÐUR OG OLJA

*Árni Joensen*

*fartekst@mail.dk*

Á hvørjum ári noyða tropiskar ódnir oljufeløgini at steðga framleiðsluni á pallunum í Meksikanska Flógvanum. Tí er marknaðurin vanur við hetta, men í ár er hetta fyribrigdið sera óheppið, skrivar Aftenposten.

At kalla øll framleiðslulið koyra við fullari megi fyri at nøkta tann stóra eftirspurningin, og tí kann hvør einasti steðgur í framleiðsluni órógva marknaðin meiri, enn gott er. Í hesum døgum er tropiski stormurin Cindy á veg ímóti amerikanska statinum Lousiana, har tann størsta oljuuppskipingarhavnin í USA er, og amerikanskir veðurmenn hava sagt, at teir vænta fleiri tropiskar stormar og ódnir í ár enn tey seinastu árini.

Tað kann skjótt ávirka oljuprísin uppeftir. Í dag kostar norðsjóvarolja, sum skal latast í september, góðar 59 dollarar fyri tunnuna, men olja, sum skal latast í desember, er komin upp á góðar 61 dollarar.

# Bush í Danmark



Fyri aðru ferð hevur ein amerikanskur forseti vitjað í Danmark. Fyrrakvøldið kom George W. Bush til Keypmannahavnar at tosa við Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra um ymisk politisk mál. Harafturat helt hann sín 59 ára føðingardag í Danmark í gjár, áðrenn hann fór á G8-fundin í Skotlandi.

Fyrru ferð ein amerikanskur forseti vitjaði Danmark var í 1997, tá Bill Clintion var á vitjan.

# Milliónir av arbeiðsleysum

**Arbeiðsloysið í Evropa veksur og kann gerast størri enn í nítiárunum**

ARBEIÐSLOYSI

*Árni Joensen*

*fartekst@mail.dk*

Tann evropeiski búskapurin er í trupulleikum. Orsøkirnar eru fleiri, men høvuðsorsøkirnar eru dýr olja, lønarvøkstur og kappingin frá londum, sum hava eitt lægri lønarlag. Tað ger, at fyritøkur aftra seg við at seta fleiri fólk í arbeiði, og at tær heldur royna at fáa sum mest burtur úr tí einstaka. Hetta er óheppið fyri arbeiðsloysið, og úrslitið kann gerast, at arbeiðsloysið í Evropa verður størri enn seinast í nítiárunum, skrivar Wall Street Journal.

Í Týsklandi hava heili 11,7 prosent av teimum arbeiðsføru einki at gera, og í teimum tólv evrulondunum er arbeiðsloysið 8,8 prosent í meðal. Men tað kann gerast uppaftur verri, sigur Dirk Schumacher, sum er búskaparfrøðingur hjá Goldman Sachs.

Frammanundan hevur OECD kunngjørt eina frágreiðing, sum millum annað segði, at eingi útlit ery fyri nøkrum bata í Týsklandi opg Fraklandi fyrr enn næsta ár.